# Brak í grótbrotinum við Brotið

**Leygarkvøldið, 12. juni kl. 21 verður stór útikonsert við Týr, I am og Høgna Lisberg**

EYSTANSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinastu tvey árini hevur verið skipað fyri uttandura poppkonsert á parkeringsøkinum omanfyri handilin, Brotið í Saltangará. Ætlanin hjá stigtakarunum er, at konsertin skal gerast eitt afturvendandi tiltak.

Á konsertini í ár luttaka bólkarnir, Týr, I am og Høgni Lisberg.

Tað er Mentanarhúsfelagið, sum skipar fyri.

Eydnast er at fáa nakrar av allarfremstu tónleikabólkunum og sangarum í Føroyum at luttaka.

## Týr á heimavølli

Á Eystanstevnu spæla Týr á heimavølli. Seinasta heyst flutti størri parturin av manningini heimaftur til Føroya eftir fleiri ár í útlegd í Keypmannahavn. Nú venur Týr í Saltangará, og teir hava júst fingið ein guitarspælara aftrat. Eftir at fleiri góðir menn høvdu roynt seg, valdi bólkurin ein íslendskan víking.

Seinasta árið hevur Týr verið víða og spælt til ymisk tiltøk, eitt nú í Ruslandi, Letlandi, Noregi, Póllandi, Danmark og fleiri ferðir í Íslandi.

Síðan stóra hittið, Ormurin Langi, hevur bólkurin havt eitt serligt pláss í hjartanum hjá rokkelskandi norðurlendingum. Útgávurnar, How Far To Asgaard og Eric The Red eru givnar út í fleiri londum.

Á Eystanstevnukonsertini fara Týr at spæla øll tey kendu løgini, har fleiri teirra hava eydkenda føroyska stevið og sum hava gjørt Týr til nakað serstakt føroyskt.

## I am

Síðan gospelbólkurin, I am, varð stovnaður, hevur bólkurin verið kendur fyri at gera góðan melodiøsan rocktónleik við andaligum boðskapi. Bólkurin hevur luttikið á Prix Føroyar fleiri ferðir við góðum úrslitum, og í fjør vann I am føroyska Gospel Prix'ið.

I am gav í 1999 út fyrru fløguna, Cast. Á fløguni vóru eitt nú tvey løg, Alla leið og Willy vs. Jesus, sum gjørdist nr. 1 á 15 teimum bestu. Eisini løgini, Friðsæl stund og Believe, hava verið ovast á føroyska listanum. Í fjør kom onnur útgáva hjá I am "xthree.one.four, sum hevur selt sera væl í Føroyum, og sum eisini er givin út í Danmark. Í løtuni fyrireika teir seg til summarkonsertferð í Evropu. Men fyrst verða teir at hoyra á Eystanstevnu, leygarkvøldið, 12. juni.

## Høgni Lisberg

Høgni Lisberg er kendur sum trummusláari í Clickhaze, men í fjør gav hann út eina solofløgu, Most Beautiful Things, við egnum tekstum og løgum. Fløgan hevur fingið góð ummæli frá altjóða ummælarum.

Eisini í Føroyum er fløgan væl móttikin.

Atgongumerkini til konsertina kosta 120 krónur. Tey fáast til keyps í Kiosk Vár og í Kunningarstovuni í Saltangará. Við dyrnar kostar atgongumerkið 150 krónur.



*Tveir av manningini í Týr, Gunnar H. Thomsen og Kári Streymoy*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Aftur í ár er Mentanarhúsfelagið ein partur av teimum tiltøkum, sum skipað verður fyri á Eystanstevnu. - Vit vóru við fyri aðru ferð í fjør og høvdu fleiri góð tiltøk við, sum ikki hava verið partur av stevnunum áður, sigur Kári Thorsteinsson, formaður í Mentanarhúsfelagnum, sum vónar, at felagið skjótt fær síni egnu hølir – sítt Mentanarhús í Runavíkar kommunu*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Vilja hava mentanarhús í Runavík

**Men felagið situr ikki á teirri latu síðuni, hóast ætlaða mentanarhúsið í kommununi dregur út. Felagið tekur lut í Eystanstevnuni og skipar annars fyri ymiskum mentanarligum tiltøkum gjøgnum árið**

EYSTANSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Endurstovnaða Mentanarhúsfelagið í Runavíkar kommunu hevur, síðani vit høvdu Eystanstevnu í fjør, miðvíst arbeitt við málsetninginum at byggja eitt mentanarhús í kommununi.

Felagið hevur fingið Eyðun Petersen, arkitekt, at gera eina tekning og model av einum komandi mentanarhúsi í Runavík.

– Tað er einki at dylja yvir, at ætlanin hevur verið frammi um at byggja á sama øki, sum Runavíkar skúli skal byggjast á, nevniliga vestanfyri Løkin í Runavík.

Kári Thorsteinsson, formaður í Mentanarhúsfelagnum, sigur, at nevndin framvegis er í tí støðu, at bíðað verður eftir, at myndugleikarnir taka eina støðu til, hvat skal henda við økinum við Løkin.

– Sum støðan er, hava vit eina ætlan, sum vit kunna byggja víðari á, har ein tekning og eitt model eru til taks. Hesum ætla vit at arbeiða víðari við.

Hann vísir á, at Mentanarhúsfelagið hevur gjøgnum árið og millum Eystanstevnurnar skipað fyri fleiri mentanartiltøkum, eitt nú fyrilestrum og øðrum, men undirtøkan frá fólkinum hevur tíverri ikki verið serliga stór – og ógvuliga fá fólk hava verið til hesi tiltøk.

– Og tó. Okkurt tiltak hevur eydnast væl, ikki minst konsertin við 17 sangarum og Suð, har eini 150 fólk møttu.

Kári heldur, at fara fólk at taka eins væl undir við einum slíkum tiltaki framyvir, er einki at ivast í, at felagið hevur tørv á størri og betri egnaðum hølum.

– Tað er einki yvir at dylja, at okkum veruliga vanta hølir til slík tiltøk, sum tykjast at hava stóran áhuga millum fólk, sigur Kári.

## Tekur lut

Aftur í ár er Mentanarhúsfelagið ein partur av teimum tiltøkum, sum skipað verður fyri á Eystanstevnu.

– Vit vóru við fyri aðru ferð í fjør og høvdu fleiri góð tiltøk við, sum ikki hava verið partur av stevnunum áður.

Hann vísir á, at Mentanarhúsfelagið skipaði fyri stórari uttandura konsert á økinum omanfyri Brotið og fyri stevnukabarett í Glyvra skúla.

– Stevnukabarettin var stak væl dámd í fjør, og nógv fólk vóru til kabarettirnar.

Aftur í ár verður skipað fyri stevnukabarett og hevur ein bólkur arbeitt miðvíst við ætlanini í eina tíð.

– Vit hava skilt, at nógv fólk gleða seg til tiltakið aftur í ár, sigur Kári.

Sum siður hevur verið í mong ár, endar Eystanstevnan við kvøldsetu í Ítróttarhøllini í Runavík.

Ein bólkur hevur tikið sær av at fáa eina sera spennandi skrá upp at standa.

Formaðurin í Mentanarhúsfelagnum væntar, at kvøldsetan aftur í ár verður á einum rættliga høgum støði, har innihaldið bæði verður tónleikur, sangur og skemt.

Kvøldsetan vendir sær til ein sera breiðan skara av fólkinum, bæði til gaman og álvara.

– Vit vóna, at nógv fólk koma til kvøldsetuna, sum verður í Ítróttarhøllini í Runavík, sunnukvøldið, 12. juni kl. 21. Vit fara í hvussu er at gera okkara til, at hetta verður ein góð kvøldseta, sigur Kári Thorsteinsson, sum vegna Mentanarhúsfelagið ynskir øllum eina góða Eystanstevnu.






UTTAN ÚR HEIMI

# Kerry smyr Bush av

**Hevði forsetaval verið í USA nú, hevði John Kerry hølvað George W. Bush, forseta av**

VAL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Hevði amerikanska forsetavalið verið nú, hevði USA fingið nýggjan forseta.

Tað er úrslitið av einari kanning hjá blaðnum Los Angeles Times. Kanningin vísir, at demokratiska valevnið John Kerry hevði fingið 51 prosent av atkvøðunum, og at George W. Bush hevði fingið 44 prosent.

Verður tað óhefta valevnið Ralph Nader tikin við, fær Kerry 48 prosent og Bush 42 prosent.

Sambært somu kanning eru 55 prosent av amerikanarunum misnøgdir við amerikanska politikkin í Irak, og 54 prosent eru misnøgd við búskaparpolitikkin hjá Bush-stjórnini. Hinvegin halda 51 prosent, at Bush hevur roynst væl sum amerikanskur forseti, tá tað snýr seg um bardagan ímóti yvirgangi. Tað halda 47 prosent ikki.

Politiskir eygleiðarar siga við Los Angeles Times, at teir flestu veljararnir tykjast vilja hava eina broyting í innanríkispolitikkinum, og at USA eigur at velja eina aðra uttanríkispolitiska kós.



*Demokraturin John Kerry hevði vunnið greiðan sigur, var forsetaval í USA nú*

# Tey fátæku skulu hava frið at roykja

**Bretski heilsumálaráðharrin heldur, at tey fátæku hava so lítið at gleðast um. Tí eiga tey at fáa frið at roykja**

ROYKING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Hvat hevur ein 21 ára gomul einsamøll mamma við trimum børnum, sum býr í einum fátækrabýlingi, at gleðast um? Stundum er sigarettin tað einasta, sum kann gleða hana, sigur Peter Reid, sum er heilsumálaráðharri í Bretlandi.

Bretskir roykjarar fegnast um orð hansara, men í teirri politisku andstøðuni er Reid fyri hvøssum atfinningum. Hetta er ikki fyrstu ferð, at ráðharrin hevur elvt til kjak um royking. Hann hevur eina ferð sagt, at royking er ikki tann størsti trupulleikin í teimum fátæku býarpørtunum, men at tað er meðalstættin í Bretlandi, sum ger roykingina til tann størsta trupulleikan.

Heilsutalsmaðurin hjá teimum konservativu, Andrew Langsley, sigur við BBC, at tað er vónleyst at fylgja við, hvat stjórnin heldur um royking. Samstundis sum stjórnin stuðlar felagsskapum, sum stríðast ímóti royking, heldur ráðharrin í heilsumálum tað vera gott, at summi roykja, sigur hann.



# Tingmenn máttu á sjúkrahús aftan á bardaga

**Bardagi í tjóðartinginum í Sri Lanka endaði við, at tveir tingmenn máttu á sjúkrahús til viðgerðar**

SRI LANKA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Menn fóru til hendurs, tá umleið 20 tingmenn kringsettu røðarapallin í einari roynd at forða einum munki, sum er limur í andstøðuni, at taka orðið. Tá tingformaðurin, sum eisini er andstøðumaður, royndi at sissa teir illu tingmenninar, varð hann tikin av ræði. Í Sri Lanka hevur tingformaðurin ein serligan lut standandi á borðinum sum tekin um vald hansara, men teir illu tingmenninir gjørdu ikki mætari enn at fara avstað við tí.

Munkurin, sum skuldi taka orðið, mátti á sjúkrahús, og ein annar munkur, sum royndi at hjálpa honum, mátti eisini í sjúkrabilin.

Sambært einum embætismanni var tað ikki greitt, hvør var farin við tignarlutinum hjá tingformanninum. Men luturin má fáast aftur, tí sambært lógini kann tingið ikki halda fund, uttan at tignarluturin er í tingsalinum, skrivar Reuters.

## Nógvir pengar til hernaðarmál

Í fjør vuksu hernaðarútreiðslurnar í heiminum ellivu prosent, soleiðis at londini nýttu 5.850 milliardir krónur til hernaðarmál.

Sambært svenska granskingarstovninum SIPRI var tað serliga tann amerikanski bardagin ímóti yvirgangi, sum fekk hernaðarútreiðslurnar at veksa so nógv í fjør. Stovnurin sigur eisini, at USA stendur fyri næstan helminginum av heimsins hernaðarútreiðslum. Í dag brúkar USA líka nógvar pengar til hernaðarmál, sum landið brúkti í áttatiárunum, í Korea-krígnum og í Vietnam-krígnum.

Síðani atsóknirnar at USA 11. september í 2001 eru útreiðslurnar til hernaðarmál kring heimin vaksnar 18 prosent. Hetta er beint tað øvugta av tí, sum hendi í nítiárunum, tí tá minkaðu hernaðarútreiðslurnar aftan á tað kalda kríggið, skrivar SIPRI í einari frágreiðing.

## Statoil gjørdi kvetti

Almenna norska oljufelagið Statoil fekk væl burturúr, tá norska olju- og orkumálaráðið lutaði nýggjar leitingarleiðir út fyrr í vikuni. Av teimum 16 leitingarloyvunum, sum vórðu útlutað, fekk Statoil tey fýra, og harafturat er felagið við í fimm øðrum loyvum saman við øðrum feløgum.

Myndugleikarnir høvdu boðið 90 leitingarleiðir út, men oljufeløgini høvdu bara áhuga í 50 teirra. Kortini er Einar Steensnæs, oljumálaráðharri, væl nøgdur við áhugan fyri tí átjanda útbjóðingarumfarinum, sum er tað størsta, síðani norðmenn fóru undir oljuleiting í sekstiárunum. Eydnast leitingin á teimum nýggju leiðunum væl, kunnu feløgini finna meiri enn hundrað nýggjar brunnar, sigur Einar Steensnæs.

Gjørdi Statoil kvetti, fekk norski staturin eisini væl burtur úr hesum útbjóðingarumfarinum. Staturin eigur 82 prosent av Statoil, og hann eigur eisini 42 prosent av Norsk Hydro, sum fekk tvey leitingarloyvi, og sum harafturat er við í tveimum øðrum loyvum.

## Vil ikki gjalda

Herfyri gjørdi ES-nevndin av, at amerikanska fyritøkan Microsoft skal gjalda smáar fýra milliardir krónur í bót fyri at hava misnýtt sína støðu á marknaðinum.

Men Microsoft hevur ongan hug at gjalda, og í gjár kunngjørdi formaðurin í felagnum, Bill Gates, at felagið hevur gjørt av at leggja málið fyri dómsvaldið hjá ES. Evropasamveldið hevur í seinastuni lagt stóran dent á fría kapping á marknaðinum, og ósemjan við ta stóru amerikonsku fyritøkuna verður roknað sum ein verulig styrkiroynd.

Ákæran frá ES kom aftan á eina fimm ára langa kanning, og í Bruxelles verður roknað við, at nú Microsoft hevur kært avgerðina, ganga í hvussu er eini trý ár, áðrenn tann endaliga avgerðin fellur.

## "Norway" til sølu

Avstralska reiðaríið Star Cruises hevur gjørt av at selja ferðamannaskipið "Norway", sum einaferð var heimsins størsta skip av sínum slagi.

"Norway" er 43 ára gamalt, og tann, sum hevur áhuga og nóg mikið av pengum, kann fáa tað fyri einar 180 milliónir krónur. Men skipið kann ikki sigla, tí motorurin er farin og skal skiftast út. Tí verður roknað við, at skipið fer at kosta tí nýggja eigaranum einar 360 milliónir krónur, skal tað setast aftur í sigling, skrivar Aftenposten. Tað heldur blaðið vera í meira lagi og vísir á, at tað er sera dýrt at reka eitt tílíkt skip í dag. Sambært blaðnum er ein annar møguleiki, at skipið verður umbygt til eitt flótandi hotell.

Seinasta árið hevur "Norway" ligið við bryggju í Týsklandi. Skipið sigldi í mong ár í Karibiska Havinum, men tað er ivasamt, um tað loysir aftur. Sambært Aftenposten vænta tey flestu, at skipið verður upphøgt og selt sum gamalt jarn.